## Í íshavið eftir olju

Kanadiska oljufelagið Imperial Oil ætlar sær nú at vita, um olja og gass munnu vera í undirgrundini í Beaufort Havinum, sum er havið norðan fyri amerikanska meginlandið. Imperial Oil hevur júst fingið rættindi til at leita saman við Exxon Mobil, men tað hevur kostað felagnum meiri enn tríggjar mia. krónur at fáa rættindini, skrivar Reuters. Men talsmaðurin hjá Imperial Oil sigur, at felagið væntar at fáa pengarnar aftur og meiri enn tað.



## Eykafloksting í Tjóðveldinum

Tjóðveldið fyrireikar seg til Fólkatingsvalið, sum bleiv útskrivað mikudagin og boðar til Eykafloksting sunnudagin 28.oktober, klokkan 15 á Hotel Hafnia, skrivar flokkurin í tíðindaskrivi. Tey, ið hava atkvøðurætt, eru umboð sum økisfeløgini senda til tingið, umframt Aðalstjórnin og starvsnevndin, saman við umboðum hjá Unga Tjóðveldinum. Á skránni fyri fráboðaða eykaflokstinginum hjá Tjóðveldinum er uppstilling til fólkatingsval 2007 og ymiskt.

# Gorbatjov slær manng

**- Eg eri fullgreiður yvir, at Putin verður umrøddur sum eitt bølmenni í fleiri londum í Evropa, men veruleikin er, at hann hevur roynst væl sum forseti í Russlandi. Tit gloyma ofta, at Russland er eitt torført land at stjórna, og at tað er ómetaliga stríggið at fremja reformar í einum so stórum landi. Tí er tað eitt bragd, at Putin hevur megnað at slóað fyri stabiliteti í Russlandi, heldur fyrrverandi sovjetiski stjórnarleiðarin Mikhail Gorbatjov. Mikudagin helt Mikhail Gorbatjov fyrilestur á Christiansborg**




POLITISKUR FYRILESTUR

*Páll Holm Johannesen*
*pallurin@hotmail.com*

Christiansborg: Hann var maðurin, sum stóð við stýrisvølin, tá risaveldið Sovjet datt sundur í 1991. Tann lágvaksni Mikhail Gorbatjov við tí eyðkenda móðurmerkinum hevur havt ein rættiliga avgerandi leiklut í heimssøguni. Saman við amerikanska forsetanum, Ronald Reagan, var hann fyrst og fremst tann politikarin, sum seinast í áttatiárunum legði lunnar undir at enda atomdubbingina og kalda kríggið millum stórveldini USA og Sovjetsamveldið. Tað var ikki bara úti í heimi, at Gorbatjov gjørdi vart við seg. Við hansara kjarnuhugtøkum um "Perestroika" og "Glasnoist", sum á føroyskum merkja ávikavist opinleiki og umskipan, broytti hann eisini grundleggjandi sovjettiska samfelagið.

Mikudagin var tann nú 76 ára gamli Gorbatjov á vitjan í Fólkatinginum, har hann greiddi frá sínum visjónum fyri framtíðina, og hvørjar avbjóðingar standa fyri framman í heiminum í dag.

### Stuðlar Putin

Tá tann 54 ára gamli Mikhail Gorbatjov kom til valdið í Sovjetsamveldinum í 1985, stóð hann beinleiðis í andsøgn við sínar undanmenn í kommunistiska flokkinum. Hann varð sæddur sum ein ágrýtin, litríkur og karismatiskur politikari, sum dugdi at tosa beinleiðis við fólkið í Sovjet. Ein egineiki, sum hansara undanmenn als ikki høvdu.

Hóast Gorbatjov er komin væl upp í árini, hevur fyrrverandi stjórnarleiðarin framvegis karismu og fólkatekki. Undir sínum fyrilestri á Christiansborg var hann ikki bangin fyri at lata onkra stuttliga og speiska viðmerking fella, meðan hann greiddi frá, hvussu hann sá støðuna í heiminum í dag. Og tað var ikki sørt, at Gorbatjov í einstøkum førum tók áhoyrararnar á Christiansborg á bóli. Millum annað greiddi hann greiddi frá, at hann nærum treytaleyst stuðlar kósini hjá sitandi russiska forsetanum Vladimir Putin.

- Eg eri fullgreiður yvir, at Putin verður umrøddur sum eitt bølmenni í fleiri londum í Evropa, men veruleikin er, at hann hevur roynst væl sum forseti í Russlandi. Tit gloyma ofta, at Russland er eitt torført land at stjórna, og at tað er ómetaliga stríggið at fremja reformar í einum so stórum landi. Vit hava heili 120 ymisk mál, og allar heimsins religiónir eru at finna í landinum. Tí er tað eitt bragd, at Putin hevur megnað at slóa fyri stabiliteti í Russlandi. Stabiliteturin í landinum hevur eisini havt við sær, at Russland nú er vorðin ein álítandi orkuveitari. Tí eiga tit at vísa honum nógv størri virðing enn tit gera, greiddi hann frá.

### Russland á veg

Í kjalarvørrinum av harðrendu framferðini hjá Vladimir Putin í Tjetjenia og á morðunum á fyrrverandi KBG-agentinum Alexander Litvinenko og atfinningarsama journalistinum Onnu Politkovskaja eru fleiri og fleiri atfinningarsom eygu í vesturheiminum vend ímóti stýrinum hjá Vladimir Putin. Vesturheimurin fílist millum annað á, at Putin hevur miðsavnað politiska valdið í Kreml og skert grundleggjandi frælsisrættindi hjá bæði fólki og fjølmiðlum í Russlandi. Samstundis verður russiski forsetin lagdur undir at stjórna landinum sum ein einaræðisráðharri, og hetta fær hansara kritikarar at samanbera Putin við gomlu zararnar í Russlandi. .

Men hesar atfinningar nerva ikki Mikhail Gorbatjov.

Hann vísti á, at tað framvegis ikki fyriliggja nøkur prógv um hvør beindi fyri Litvinenko ella Politkovskaju, og tí ynskti hann at halda seg til veruleikan, sum hann málbar seg. Hann greiddi frá, at støðan í Russlandi var hættislig, áðrenn Putin kom til valdið. Og henda veruleika hava evropearar lyndi til at gloyma.

- Russland var snøgt sagt í upploysn, tá Boris Jeltsin sat við valdinum. Hann lat stóran part av risa stórum almennum ognum nærum ókeypis til nakrar fáar vinnulívsmenn, sum aftur fyri hjálptu honum at varðveita politiska valdið. Russ-